## Tunnilsdagar 2009

Aftur í ár verður ókeypis at koyra gjøgnum undirsjóvartunlarnar nakrar ávísar dagar frá kl. 6 á morgni og 24 tímar fram. Norðoyatunnilin hesar dagar: 31. januar, 2. mai, 26. september og 12. desember. Vágatunnilin hesar dagar: 28. februar, 02. mai, 05. september og 12. desember



## Úr Guantanamo í kríggj

Amerikanska verjumálaráðið Pentagon vil vera við, at fleiri av monnunum, sum eru latnir leysir úr fangaleguni í Guantanamo, hava tikið virksemið sum stríðs- og yvirgangsmenn uppaftur. Talsmaðurin hjá Pentagon sigur, at myndugleikarnir hava prógv fyri, at 18 fyrrverandi Guantanamo-fangar eru farnir aftur í bardaga, og at illgruni er um, at 43 aðrir fáast við yvirgangsvirksemi. Verjumálaráðið sigur seg hava upplýsingarnar frá fregnartænastum í fleiri londum, men ráðið vil ikki siga, hvørji lond hava latið upplýsingarnar.

# Nýggju hvalbiartrolararnir koma næsta vikuskifti




**- Skipini skulu fiska fyri einar 30 miljónir krónur um árið, um raksturin skal hanga saman. Hetta er eitt stórt veiðivirði. Vit ivast onga løtu í, at hetta verður hart. Men eg eri ikki dapurskygdur. Vit eru sera spentir upp á hesa avbjóðing – og okkum dámar avbjóðingar, sigur reiðarin á fyrrverandi Navaranum og Borgaranum, Mikkjal Hammer**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Gongst sum ætlað, koma báðir trolararnir, sum suðuroyingar hava keypt frá Føroya Banka, heim aftur úr Danmark um eina góða viku. Hetta eru fyrrverandi Navarin og Borgarin, sum áður vóru undir hattinum hjá Maru Seafood í Klaksvík.

Upprunaliga eru hetta skipini, Polarhav og Stjørnan, sum leirvíkingar lótu smíða í Gdansk í Póllandi í 1990.

Tað hevur ljóðað, at felagið TG Fish, sum keypti trolararnar frá Føroya Banka, gav einar 28 miljónir krónur fyri bæði skipini, umframt at felagið í keypinum eisini fekk fiskidagarnar hjá einum ísfiskatrolara aftrat.

Eftir at handilin millum banka og nýggju eigararnar var avgreiddur um miðjan desember, hava skpini verið í Frederikshavn í Danmark.

### Gongur væl

Mikkjal Hammer, reiðari, sigur, at arbeiðið í Danmark higartil hevur gingið væl, og gongst sum ætlað, eru skipini ætlandi í Føroyum um eina góða viku.

- Ein partur stóð fyri klassing, meðan aðrir partar kundu bíða, men vit hava valt at taka alt, sum gerast skal, í einum, so steðgur ikki neyðturviliga kemur í aftur, tá hetta kanska ikki passar okkum so væl.

Hann sigur, at tað serliga eru høvuðsmotorarnir, sum eru eftirhugdir, og í løtuni bendir alt á, at skipini kunnu fara royndartúr í Danmark týsdagin, 20. januar, sum er týsdagin í næstu viku.

- Vit miðja eftir at hava skipini heima í Føroyum við endan av næstu viku, men treytin er sjálvsagt, at einki óvæntað stingur seg upp.

Spurdur, um Navarin og Borgarin hava fingið nýggj nøvn, sigur reiðarin, at hetta ikki endaliga er komið upp á pláss enn.

- Men tá loyst verður í Frederikshavn, eru nýggj nøvn á skipunum, tí siglt verður ikki við ongum nøvnum, sum hann skemtandi tekur til.

Sosialurin hevur hoyrt nøvn nevnd, men vit fara ikki at "avdúka" nakað, sum ikki fer at halda.

Reiðarin veit ikki endaliga at siga, hvar skipini fyrst koma í havn, tá tey koma til landið, men at tey koma til Hvalbiar, áðrenn tey loysa til fyrsta túr, ivast hann onga løtu í.

Spurdur, um hugsandi er, at Hvalbiar kommuna fer at skipa fyri móttøku, tá skipini koma til bygdar, sigur Mikkjal, at tað veit hann einki um at siga í løtuni.

### Skipini mannað

Mikkjal Hammer sigur, at Navarin og Borgarin fara at partrola, sum tey hava gjørt í fleiri ár, og einir 6-7 mans verða við hvørjum skipi hvønn túrin.

- Eg haldi, at skipini í seinastuni hava siglt við 6 monnum, og soleiðis verður tað helst eisini, tá tey loysa á fyrsta túri.

Hann sigur, at manningarnar so gott sum eru settar.

- Flestu eru her úr oynni, men onkur einstakur kemur norðanfjørðs. Vit hava eina blanding av royndum fólki og fólki, sum ikki hava so drúgvar royndir. Men eg haldi, at skipini verða væl mannað, tá tey loysa, leggur hann aftrat.

Mikkjal sigur, at tríggir navigatørar eru knýttir at lemmatrolaranum Sjagakletti, og tað verða hesir, sum koma at skiftast um brúnna, tá Navarin og Borgarin loysa. Hesir eru Tórhallur Randrup, John Martin Poulsen og Hanus Tausen, allir úr Hvalba.

- Hvussu vit fara at skipa okkum við manning og skifti millum túrar, fáa vit at síggja, tá vit veruliga eru komnir í gongd, sigur hann.

### Verður hart

Reiðarin í Hvalba sigur, at tað verður ikki nakar dansur á rósum at reka skipini. Hann vil framvegis ikki vátta, hvussu nógv TG Fish hevur givið fyri skipini umframt fiskidadagarnar hjá einum skipi aftrat, sum bankin eisini átti. Reiðarin vísir kortini á, at trolarar helst skulu fiska fyri einar 30 miljónir krónur um árið, um raksturin skal hanga saman.



*Reiðarin í Hvalba, Mikkjal Hammer, sigur, at skipini fara at landa, har mest fæst fyri fiskin, og har mest fæst burtur úr*